## Skrivstovufólk

Søkt verður eftir skrivstovufólki / málsviðgera til Akfaradeild at seta beinanvegin. Talan er um eitt fast starv, ið er skipað sum eitt parttíðarstarv.

**Uppgávan:**
Uppgávan fevnir m.a. um:

- Avgreiðslu av viðskiftafólki og telefonavgreiðslu
- Umsiting og avgreiðsla av skrásetingargjøldum
- Skráseting av akførum

**Førleikakrøv:**
Vit hugsa okkum ein persón við skrivstovuútbúgving, HH ella líknandi útbúgving og royndum við arbeiði á skrivstovu.
Dentur verður lagdur á góð samstarvsevnir og at viðkomandi er fyrikomandi og kundavinaligur. Tað er ein treyt, at viðkomandi hevur kunnleika til at arbeiða við teldu.

**Setanartreytir:**
Starvið er lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Starvssetanin hoyrir undir Vinnumálaráðið við tilhoyrandi stovnum, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalráð.

Upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til tlf. 350400 og tosa við Hans J. Stenberg, deildarleiðara. Umsóknir við møguligum prógvum og viðmælum skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 18. apríl 2005.

Sosialurin 341800

**Bileftirlit Føroya** | Hoyvíksvegur 57 · Postsmoga 3206 · 110 Tórshavn

*Bileftirlit Føroya er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur sum endamál at fremja akfaratøkniligar kanningar og akfaraeftirlit, stíla fyri koyriroyndum, útvega fólki koyrikort, umsita skráseting av koyrikortum og umsita akfaraskráseting, vegskatt og skrásetingargjøld. Umframt høvuðsdeildina í Tórshavn hevur Bileftirlitið sýnsdeildir um alt landið. Á Bileftirlitinum starvast 19 fólk.*




# TRAPPUTINGIÐ

## Í MIÐLAHÚSINUM Í VÁGSBOTNI
## LEYGARDAGIN 16. APRÍL KL. 18.00



GEORG METZ &
HANS ENGELL LEGGJA FYRI

EVNI:
**MIÐLARNIR - 4. STATSVALDIÐ?**
PRESSENS LØSAGTIGHED OG VIRKE SOM DEN 4. STATSMAGT

ØLL ERU VÆLKOMIN

miðlahúsið
í Vágsbotni

*SØKT VERÐUR EFTIR FÓLKI*
*til goymsluna í Idé Møblum*



SANSIR 355 355

Vit sóknast eftir einum dugnaligum og ágrýtnum fólki til alt fyrifallandi arbeiði í goymsluni.

Arbeiðið fevnir um útkoyring, at seta upp á pláss, lossa, seta møblar saman og alt annað fyrifallandi arbeiði. Tað er ein fyrimunur, um tú ert handverkari ella fittur í hondunum.

Tú byrjar at arbeiða sum skjótast. Lønin verður eftir avtalu. Vilt tú annars vita meira um starvið, ert tú vælkomin at spyrja teg fyri hjá Birgiri Andreasen á telefon 214680.

Skrivlig umsóknir verður at senda til:

IDEmøblar
Postsmoga 3220
110 Tórshavn

Sosialurin
Sosialurin
i